## 10 TING UM SIMON COWELL

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



# Ríkar seg upp av kjaftasliti

BRETSKI **SIMON COWELL** ER VÍÐAGITIN SUM TANN HARÐI DÓMARIN Í **TÓNLEIKAKAPPINGUM** Í ONGLANDI OG USA – OG HANN FORVINNUR ÓTELJANDI MILLIÓNIR FYRI SÍNA **ÓSMÆDNU** FRAMFERÐ

**1** 50 ára gamli Simon Cowell er ættaður úr Brighton í Onglandi

**2** **Pápi hansara starvaðist innan byggivinnuna, og mamman er fyrrverandi balletdansari.**

**3** Pápi hansara skaffaði honum eitt arbeiði hjá plátufelagnum EMI. Hann byrjaði í postrúminum, men arbeiddi seg upp eftir og fekk at enda ábyrgd av fleiri útgávum hjá EMI í 80'unum.

**4** Í 2001 byrjaði tað, sum Cowell er best kendur fyri. Hann gjørdist dómari í sjónvarpskappingini Pop Idol í Onglandi og árið eftir í American Idol.

**5** 2010 er seinasta kappingin, har Cowell er dómari í American Idol. Næsta ár skal ein X Factor kappingin, sum Cowell sjálvur skipar fyri, sjósetast í USA.

**6** Cowell hevur luttikið í ymiskum vælgerandi arbeiði. Millum annað fyri sjúkrahús fyri doyggjandi børn. Hann er eisini við í átøkum fyri djórafelagsskapin PETA.

**7** **Hann hevur viðurkent, at hann brúkar Botox, sum skal bøta um útsjóndina í andlitinum.**

**8** Cowell gongur í løtuni saman við Mezhgan Hussainy, og bretskir fjølmiðlar vilja verða við, at tey umhugsa at giftast og at fáa børn.

**9** – Gita hvørjir partar av upptøkunum, sum kunnu varða í 11 tímar, koma við í sendingarnar. Ikki løturnar, har eg eri fittur, men heldur tá eg eri ódámligur, sigur Simon Cowell.

**10** Í fjør keypti Cowell sær hús fyri umleið 100 milliónir krónur í Bevery Hills í USA.

## SITAT



Rættir vinir stinga teg í bringuna.

*Oscar Wilde*

## MIÐLARNIR OG EG

Í nýggja táttinum siga kendir og ókendir persónar frá síni miðlanýtslu.



LÆRARIN OG MYNDAMAÐURIN **JÓGVAN HORN** LURTAR EFTIR BBC OG LESUR MATEMATIKKLASSIKARIR.

**MÍTT BLAÐ - DAG OG VIKUBLAÐ**
Politiken og onki vikublað.

**MÍN HEIMASÍÐA:**
www.photoanswers.co.uk – har er nógv gott er at lesa um myndatøku

**MÍN TÓNLEIKUR**
Onki bestemt: The Beatles, Leonhard Cohen, Johnny Madsen, Queen...

**MÍTT SOSIALA NETVERK**
Facebook




**MÍN DVD**
»Revolver« hjá The Beatles




**MÍTT MAGASIN**
Digital Photo. Enskt fotomagasin, sum eg fái sendandi við postinum.

**MÍN SJÓNVARPSRØÐ**
Berserk!

**MÍTT ÚTVARP**
BBC Radio 5 Live á 693 kHz millumbylgju.




**MÍN BÓK**
»Fermat's Last Theorem« eftir Simon Singh

**MÍN TELEFON**
Nokia okkurt.

**HVAT VIL TÚ IKKI BRÚKA MIÐLATÍÐ UPPÁ?**
Tá hagtøl sum eru fullkomuliga óviðkomandi fyri flestu fólk gerast tíðindi. T.d. prosentvísar broytingar í veiðibýtinum hjá útlendskum skipum undir Føroyum. Geisp!

**HVAT IRRITERAR TEG Í MIÐLUNUM?**
Tá tíðindalesarar týðuliga ikki vita, hvat teir tosa um. T.d. frættu vit fyrr í ár í eini tíðindasending, at Jupiter hevði landað í NeskaUPPstaði í Íslandi!

**HVAT VIL TÚ HAVA MEIRI AV Í MIÐLUNUM?**
Kritiskan holdning og ikki reint mikrofonhaldari! Verulig bilaum-mæli, har vit fáa at vita bæði tær positivu og negativu síðurnar hjá royndarbilunum.

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos